# Leggið lyklarnar á borðið

**Longu fríggjadagin eftir løgtingsfundin skuldu landsstýrismenninir hjá Tjóðveldisflokkinum avlevera lyklarnar. Annita og Høgni náddu ikki at rudda skrivstovurnar**

*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Um tveytíðina fríggjadagin, tá Karsten Hansen var aftur á skrivstovuni í Fíggjarmálaráðnum lógu boð til hansara um at lata lyklarnar frá sær.

- Eg veit ikki um nakar roknaði við at eg fór at taka nakað við mær, sum ikki var mítt. Eftir øllum at døma hevur álitið á meg verið so lítið, sigur Karsten Hansen, sum ikki náddi at siga starvsfólkunum farvæl.

Karsten Hansen var landsstýrismaður í fíggjarmálum í næstan seks ár.

- Tað kendist løgið at vera uppsagdur upp á handan mátan. Tað kendist óvirðiligt. Eg hevði einki skeivt gjørt. Løgmaður hevði gjørt nakað skeivt og ruddiliga tað. At loysnin so var at koyra meg til hús og sjálvur vera sitandi, haldi eg var løgið, sigur Karsten Hansen.

- Eg havi verið í mongum hørðum leiki, har nógv hevur staðið á, men eg havi eisini verið ein av teimum, sum hevur gingið í millum. Eg havi havt gott samstarv við Anfinn Kallsberg, men at taka lyklarnar frá mær á handan hátt kendist óvirðiligt.

Eisini Anita á Fríðriksmørk skuldi av við lyklarnar longu fríggjadagin.

- Har vóru boð komin úr erva. Eg haldi tað var eitt sindur snedigt, sigur Anita á Fríðriksmørk.

# Royk, drekk og et keks

**Allar ætlaninar hjá landsstýrinum um nýggj avgjøld fella burtur, nú nýval er útskrivað. Sigarettir, keks og sotavatn halda verandi prís - í hvussu so er fyribils**

FYRIBILS LÓGIR

*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Sigarettirnar dýrkað ikki 1. januar og sotavatn og keks halda prísin. Øll avgjøld, sum vóru ein partur av uppskotinum til fíggjarlóg fella burtur.

Ein fíggjarlóg við tveimum greinum í verður í dag borin í Løgtingið. Ikki ein upphædd verður nevnd í fíggjarlógaruppskotinum. Men løgtingið skal saman einaferð afturat áðrenn nývalið, fyri at samtykkja tær báðar greinirnar.

- Vanligi raksturin av samfelagnum skal halda fram. Tí verður verandi fíggjarlóg bara longd, sigur Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum.

Hann hevur sagt farvæl við Karsten Hansen, landsstýrismann, sum ruddaði sína skrivstovu longu mánamorgunin. Og nýggi stjórin hjá honum er Anfinn Kallsberg.

Landið kann ikki stýrast uttan eina fíggjarlóg, sum gevur landskassanum rætt at krevja skatt inn og at gjalda lønir. Men tá nýval verður útskrivað fella øll lógaruppskot burtur - eisini uppskotið til fíggjarlóg fyri 2004.

## Skattalættin stendur við

Talan er um eina bráfeingis játtanarlóg, sum gevur landsstýrinum møguleikan av halda fram. Í fyrru greinini í uppskotinum til fíggjarlóg verður sagt, at landsstýrið skal hava heimild at uppkrevja beinleiðis og óbeinleiðis skattir og landsstýrið skal sleppa at rinda neyðugar útreiðslur, so landshúsarhaldið kann halda fram ótarnað.

Onnur greinin sigur bara, at lógin kemur í gildi 1. januar 2004.

Skattalætin, sum løgtingið samtykti fyrr á ár, stendur við og lønir til almenn starvsfólk vera goldnar eftir nýggju sáttmálunum.

Almennu stovnarnir vita tí ikki enn, um teir skulu spara næsta ár. Ikki fyrr enn eitt nýtt løgting samtykkir eina nýggja fíggjarlóg verður greitt, um lønarhækkingarnar skulu sparast inn aftur ella játtaninar verða hækkaðar við lønarvøkstrinum.


FØROYA LANDSSTÝRI

KP/pp

Tíðindum 18.12.90
J. Nr. 2500-3/90

Føroya Løgting

Løgtingsmál nr. 19/1990: Fyribils fíggjarlóg.

Uppskot

til

| | |
|---|---|
| løgtingslóg um fyribils játtanarlóg fyri 1991. | lagtingslov om midlertidig bevillingslov for 1991. |
| § 1. Til fíggjarlógin fyri fíggjarárið 1991 er viðtikin, verður landsstýrinum heimilað at uppkrevja skattir og gjøld eftir galdandi lógum. Landsstýrinum verður heimilað í sama tíðarskeiði at rinda neyðugar útreiðslur, soleiðis at landshúsarhaldið ótarnað kann fara fram og átiknar skyldur verða hildnar. | § 1. Indtil finansloven for finansåret 1991 er vedtaget, bemyndiges landsstyret til at opkræve skatter og afgifter efter gældende love. Landsstyret bemyndiges til i samme tidsrum at afholde nødvendige udgifter, således at landshusholdningen uforstyrret kan fortsætte og påtagne forpligtelser opfyldes. |
| § 2. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1991. | § 2. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1991. |

121

POSTHÚSM 64 - FR 110 TORSHAVN - TLF. 11280 - TELEX 81310

*Í 1990 samtykti løgtingið eisini eina bráfeingisfíggjarlóg, so landskassin kundi innkrevja skattir og gjalda rokningar.*

## Rentustuðul og barnavernd

Øll onnur uppskot fella eisini burtur og skulu leggjast fyri av nýggjum. Umframt uppskotini at leggja avgjøld sigarettir, keks, sotavatn og beriposar, vóru fleiri onnur.

Ætlanin hjá landsstýrinum var at lække rentustuðul in úr 40 prosentum niður í 37 prosent, men tað verður so ikki í hesum sambandi. Og ivasamt er um tað ber til at samtykkja eina slíka broytin í einumn nýggjum løgtingið, so broytingin kemur í gildi í 2004.

Sama er við ætlanunum at avtaka stuðulin til uppihaldspengar. Tað lógaruppskotið var heldur ikki ligugt viðgjørt, tá løgmaður útskrivaði val.

Eitt annað stórt má var uppskotið um at umskipa barnaverndirnar. Uppskotið hevur verið á veg í fleiri ár, men endar nú aftur hjá næsta landsstýrismanninum í almannamálum.

Í alt eru 16 uppskot sum falla burtur. Harafturat eru fleiri fyrispurningar, sum ikki vera svaraðir.

## Einki nýtt

Landsstýrið hevur næstu seks vikurnar bara til uppgávu at reka landshúsarhaldið, so tað kann halda fram ótarnað.

Eingi nýggj tiltøk mugu setast í verk av einum landsstýri, sum situr fyribils.

- Landsstýrið kann ikki gera annað enn tað, sum er alneyðugt, til tess at fyrisitingin kann halda fram ótarnað, stendur í stýrisskipanarlógini.

**Fakta**

Grein 31 í stýrisskipanarlógin sigur, hvussu landið skal stjórnast, tá løgmaður hevur lagt frá sær:

31. Hevur løgmaður biðið um at verða loystur úr embæti sbr. § 29, ella løgtingið hevur váttað honum misálit sbr. § 30, starvar landsstýrið, til nýggjur løgmaður er tilnevndur. Í tíðarbilinum fram til, at nýggjur løgmaður er tilnevndur, kann landsstýrið ikki gera annað enn tað, sum er alneyðugt, til tess at fyrisitingin kann halda fram ótarnað. Løgmaður kann tó innan eina viku eftir, at hann fekk misálit, nýta heimild sína í § 6, stk. 2, at skriva út nýval.



# Løgmaður bar seg skeivt at

**Tað var ein fráfarin løgmaður, sum skrivaði út nýval, og tað hevði hann í prinsippinum ikki rætt til, sigur ein av faddrunum at stýrisskipanarlógini. Men talan er um smáputl, leggur hann afturat, tí alt varð gjørt um eina leið**

UPPSØGN

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Anfinn Kallsberg á veg niðan til løgtingið, har hann løtu seinni skrivar út nýval. Saman við løgmanni gingu Bjarni Djurholm og Jacob Vestergaard, ið eru virkandi til landstýrismenn, til komandi samgongan er skipað*

Fyrst segði løgmaður teimum fýra tjóðveldisfólkunum úr landsstýrinum. Síðan segði hann seg sjálvan úr starvi. Og at enda handaði hann løgtingsformanninum brævið, har hann skrivaði út nýval.

Formliga var hetta ikki í lagi, sigur Bjørn á Heygum, advokatur, sum var ein teirra, ið skrivaði stýrisskipanarlógina. Hann viðgongur, at hann gjørdist eitt sindur skakkur, tá ið hann hoyrdi raðfylgjuna, sum løgmaður handaði løgtingsformanninum brøvini, har hann tók sínar avgerðir.

– Tá ið løgmaður hevur sagt seg sjálvan úr starvi, so situr hann bara sum leiðari fyri einari starvsstjórn, til nýggjur løgmaður aftur er valdur av løgtinginum. Tað merkir, at hann ikki kann taka avgerðir av týdningi longur. Frá tí sekundi, hann hevur lagt frá sær, er hann ikki løgmaður við fullum heimildum longur, og tí hevur hann í prinsippinum heldur ikki rættin at skriva út nýval, sigur Bjørn á Heygum.

Løgmaður útskrivaði kortini løgtingsval, og tað eigur sjálvandi at vera galdandi, heldur advokaturin

– Tú kanst velja at síggja tað í eini heild, har løgmaður gjørdi alt í somu vending. Men reint logiskt hongur tað ikki saman. Tingini skulu henda í røttu raðfylgju, og løgmaður átti at skriva út nýval, áðrenn hann legði frá sær, sigur Bjørn av Heygum.

Hevði misálit verið lagt fram ímóti løgmann, so kundi hann kortini skriva út nýval eftir eina viku. Men tað er ein serlig heimild, sum er givin honum í stýrisskipanarlógini, og tað prógvar, at hann ikki hevur rætt til tað annars.

Tað ljóðaði í løgtinginum fríggjadagin, at ávísir tingmenn úr andstøðuni umhugsaðu at leggja fram misálit á teir írestandi landsstýrismenninar hjá Fólkaflokkinum fyri at forða teimum í at misnýta landsstýrissessin til at føra valstríð. Men sambært løgtingsskrivstovuni verður eitt slíkt misálit afturvíst av løgtingsformanninum, um tað verður sett fram. Uppsøgnin av samgonguni er í roynd og veru at sammeta við eitt misálit á landsstýrismenninar, sum bara eru ein starvsstjórn við avmarkaðum heimildum, og tí ber ikki til at seta fram misálit á teir.

# Flokkarnir longu farnir til verka

**Valið kom nakað knappliga, men politisku flokkarnir eru longu farnir til verka. Anfinn Kallsberg stillar uppaftur, Javnaðarflokkurin hevur ein jokara í ermuni og Tjóðveldisflokkurin vil hava fullveldismálið aftur á dagsskrá**

VALSTRÍÐ

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Politisku flokkarnir hava fingið skund. Løgtingsval er útskrivað at vera týsdagin 20. januar 2004, og tríggjar vikur undan valinum, skulu flokkarnir hava latið valevnislistarnar inn. Tað vil siga í seinasta lagi týsdagin 30. desember.

Seks vikur til valstríð verður ikki hildið at vera lítið aðrastaðni, men tíðin at fáa valevnini klár er knøpp. Flokkarnir eru longu farnir undir at skipa fyri fundum, har innkomnu uppskotini til valevni vera vigað.

## Anfinn stillar upp

Fólkaflokkurin sat á fundi mánadagin, tá ið Sosialurin royndi at fritta, um høvuðspersónurin síðstu dagarnar, Anfinn Kallsberg, løgmaður, stillar uppaftur.

– Sjálvandi. Hann kemur aftur við fullari styrki, segði Óli Breckmann teskandi í fartelefonina. Løgmaður hoyrdist í bakgrundini, har hann greiddi frá støðuni síðstu dagarnar.

Løgmann sjálvan fingu vit ikki orðið á, men sostatt skuldi allur ivi verið ruddaður av borðinum, um Anfinn Kallsberg stillar uppaftur. Spurningurin er, hvussu hansara val verður hesaferð. Tað er hugsandi, at norðoyingar fara at gera manngarð um mannin, sum er tikin í at hava svikað fyri 20 til 25 árum síðan. Boðskapurin hjá Anfinni um, at tað umráddi at bjarga nøkrum arbeiðsplássum, fær hann helst samhuga fyri.

Hinir stóru flokkarnir hava ikki sagt seg viljað í eina samgongu, har Anfinn Kallsberg er løgmaður, og tí má Fólkaflokkurin helst leita sær eftir einum nýggjum løgmansevni.

## Ein javnaðarjokari

Javnaðarflokkurin stillar kanska ein jokara upp, tá listin er klárur 30. desember, avdúkar Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins. Men hann vil ikki siga, hvør tað verður.

– Vit eru klár at fara í valstríð. Ideologiskt eru vit ótrúliga væl fyri, og økonomiskt eru vit rímiliga væl fyri, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sat eisini á fundi á Gamla Apoteki júst um valið, tá vit ringdu til hansara. Hann viðgongur, at valið kom nakað knappliga á tey, men annars eru tey altíð klár til val.

– Eg havi altíð hildið, at seks vikur er í so langt tíðarskeið til eitt valstríð. Í Danmark eru tað bara tríggjar vikur, og tá brenna tey alt av í fullum dampi. Her merkja vit ofta eina linking, sum tíðin gongur, tí tað er ov langt. Kanska er tað ein fyrimunur, at jólini koma ímillum. Eg haldi tað hevði verið eitt hugskot, um flokkarnir og almennu fjølmiðlarnir, sum stýra ein part av valstríðnum, samdust um at koyra á frá 3. januar og úteftir, sigur Jóannes Eidesgaard.

Annars fáa tey nokk at gera kortini, tí tríggir uppstillingarfundir skulu avgreiðast áðrenn 30. desember. Aftur vísir Jóannes Eidesgaard til Danmark, har vallistarnir altíð eru klárir. Í Føroyum standa flokkarnir á berum hvørja ferð, tað verður boðað til val. Hjá Javnaðarflokkinum ræður stutt og greitt um at koma aftur til stjórnarvaldið eftir oyðimarkargongd í sjey ár.

## Fullveldi til fólkið

Tjóðveldisflokkurin ger eisini skjótt av, og innkallað var til fundar longu mánakvøldið hjá Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag. Tríggir uppstillingarfundir skulu haldast, og ætlanin er at fáa málið avgreitt áðrenn jól.

– Vit skulu hava fullveldismálið aftur til fólkið. Í 2001 var fólkaatkvøðan tikin frá okkum, og tískil endaði sjálvstýrismálið aftur í tí partapolitiska spælinum, sum tað altíð hevur ligið í. Vit fara til val uppá, at Grundlógin skal til fólkaatkvøðu. Eg haldi, at tað var ein beinleiðis samanhangur millum ta optimismu og tann framburð, sum var í samfelagnum, og fullveldismálið, tá tað enn var í fólkinum, sigur Høgni Hoydal, formaður floksins. Tað vera stórt sæð tey somu fólkini, sum stilla uppaftur, skilst, men Leivur Hansen, sjónvarpsmaður og fyrrverandi borgarstjóri í Havn, hevur longu boðað frá, at hann ikki stillar uppaftur. Annars eru tað fleiri, sum aftur eru í kuldanum, tí landsstýrisfólkini vóru søgd úr starvi. Jógvan Arge og Rói Egholm noyddust at lúta, tí Høgni Hoydal og Annita á Fríðriksmørk komu aftur á ting, men teir kunnu so ugga seg við, at teir hava fingið høvi at gjørt vart við seg ta tíðina, teir hava sitið á løgtingi.